Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Tilmæli um koppseting og sóttarhald

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin koppsett seg fyri koronuvirus til tess at røkja sítt arbeiði sum landsstýrismaður í uttanríkismálum?
2. Hevur landsstýrismaðurin verið í einum brúdleypi, har tíggjutals fólk seinni eru testað positiv fyri koronu?
3. Um landsstýrismaðurin ikki er koppsettur og hevur verið í einum brúdleypi, har tíggjutals fólk eru testað positiv fyri koronu, hevur landsstýrismaðurin so aftaná verið í sóttarhaldi?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum kunngjørdi í mai 2021, at hann ikki ætlar at koppseta seg. Fyri viku síðani, 4. november, almannakunngjørdi Dimmalætting, at sami landsstýrismaður var ein av gestunum í brúdleypi, har tíggjutals fólk seinni eru testað positiv fyri koronu. Tað verður mælt til at fara í sóttarhald í 10 dagar, um ein er ókoppsettur og hevur havt beinleiðis samband við ein, sum hevur fingið staðfest koronuvirus. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 11. november 2021

Ingilín D. Strøm